UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

SEV

Kommunufelagið

# SEMJUSKJAL

*Havandi í huga* skyldu Føroya til at avmarka útlátið av vakstrarhúsgassum;

*Havandi í huga* felags málið hjá almennu Føroyum og SEV um, at øll orkunýtsla á landi frameftir skal vera úr varandi orkukeldum;

*Ásannandi* at hetta krevur, at elframleiðslan úr varandi orkukeldum skal fleirfaldast komandi árini;

*Ásannandi* at orkumyndugleikin, sum leggur til rættis orkupolitikkin og skipar útboð sambært elveitingarlógini, og kervisábyrgdarin, sum varðar av elnetinum, hevur veitingarskyldu og tryggjar elgóðskuna til brúkaran, eiga at samstarva tætt;

*Ásannandi* at samstarvandi partarnir í felag eiga at virka fyri, at føroyska elkervið støðugt verður ment, styrkt og rikið á ein fyri brúkaran ódýran hátt;

*Ásannandi* at hóast tilboð verða ment í sambandi við avlopsorku ella til at stimbra undir elnýtslu frá varandi orkukeldum, so verður hildið fast við samhaldsfasta skipan, soleiðis at prísskráin fyri el er eins uttan mun til hvar í landinum fólk búgva;

*Havandi í huga* at í eini skipan við elframleiðslu frá lutvíst óstøðugari orku eiga fleiri partar í skipanini – kervisábyrgdarin, elframleiðarar, vinnufyritøkur og vanligi brúkarin við vitbornari tøkni – lut í at tryggja eitt vælvirkandi og støðugt elkervi,

**eru** landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum og samráðingarnevnd fyri Kommunufelagið/SEV[1] komin ásamt um:

1. At lutafelagið SEV eigur, rekur og hevur kervisábyrgdina fyri elskipanini.

   Lutafelagið SEV hevur í hesum sambandi skyldu til at tryggja fult gjøgnumskygni í sínum tænastum, at veita øllum framleiðarum javnbjóðis tænastur og annars fylgja teimum reglum og treytum, sum verða settar monopolvirksemi lutafelagsins.

   Fyri at tryggja at hesin parturin av virkseminum hjá lutafelagnum SEV, sum ikki fer fram í kapping, støðugt heldur eitt rímiligt kostnaðarstig, skal lutafelagið SEV regluliga sammetast

---

[1] Samráðingarnevndin umboðandi kommunalu ánararnar av SEV varð skipað á eykaaðalfundi í SEV 26. november 2021. Í samráðingarnevndini eru formaðurin í Kommunufelagnum, næstformaðurin í Kommunufelagnum og formaðurin í nevndini fyri SEV.

við sambæriligar útlendskar kervisábyrgdarar (*Benchmark-kanning).* Lutafelagið SEV og orkumyndugleikin semjast um leist fyri, hvussu slík kanning kann verða gjørd.

2. At kervisábyrgdin í hesum sambandi fatar um elnetið, rakstur av skipanarberandi eindum[2] og systemábyrgd.[3]

3. At pumpuskipan millum verandi byrgingar í Heygadali og á Mýrunum í Vestmanna verður skilmarkað sum skipanarberandi eind.

4. At lutafelagið SEV kann taka lut í útboði, tá ið orkumyndugleikin bjóðar út varandi orkuframleiðslu. Hetta kann tó ikki verða gjørt beinleiðis í lutafelagnum sjálvum, men krevur at fylgja hesum treytum:

   a) Lutafelagið SEV setir á stovn dótturfelag, sum hevur sjálvstøðuga nevnd og leiðslu uttan persónssamanfall við lutafelagið SEV.
   b) Dótturfelagið tekur lut í javnbjóðis kapping við aðrar partar, sum taka lut í útboðnum, t.e. dótturfelagið eigur ikki at hava fyrimun av, at móðurfelagið hevur ábyrgdina av føroyska elkervinum.
   c) Um dótturfelag hjá lutafelagnum SEV vinnur útboð, tá ið orkumyndugleikin bjóðar út varandi orkuframleiðslu, skal virksemið rakstrarliga skipast sambært reglum og krøvum frá orkumyndugleikanum, t.e. dótturfelagið eigur ikki at hava rakstrarligar fyrimunir av, at móðurfelagið hevur ábyrgdina av føroyska elkervinum.
   d) Verandi dótturfeløg hjá lutafelagnum SEV, sum framleiða vindorku, verða frameftir skipað við sjálvstøðugari nevnd og leiðslu uttan persónssamanfall við lutafelagið SEV.

   Brotini frammanfyri forða ikki fyri, at lutafelagið SEV skipar sína varandi orkuframleiðslu í einum og sama dótturfelag.

5. At orkumyndugleikin og lutafelagið SEV sum kervisábyrgdari gera og semjast um tíðarfesta ætlan fyri útboð av verkum við varandi orku, soleiðis at útboðini og útbygging av elskipanini (net v.m.) ganga hond í hond, t.e. at ravmagnskervið á staðnum, har vindumyllulundir verða staðsettar, er nøktandi útbygt til at taka ímóti nýggju orkuni.

   Fyrsta ætlanin skal gerast liðug í fyrru hálvu av 2022 og eigur í minsta lagi at fevna um útbyggingar fyri komandi fimm árini og metingar fyri næsta fimm ára skeiðið. Tíðarfesta ætlanin verður dagførd árliga, og verður løgd fyri landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum til góðkenningar.

6. At orkumyndugleikin og lutafelagið SEV gera royndarskipan, sum eggjar kundum til økta orkunýtslu, tá ið serliga nógv varandi orka er til, t.e. royndarskipan, har vindorka verður boðin

---

[2] Skipanarberandi eindir eru størru diesel- og vatnorkuverkini, t.e. verkini, sum hava megina til at tryggja støðugan mátt, umframt ætlað pumpuskipan í Vestmanna, sí brot 3.

[3] Systemábyrgdarin (systemoperatørurin) tryggjar, at framleiðsla og nýtsla alsamt samsvara. Tískil hevur systemábyrgdarin møguleika fyri at økja ella minka um framleiðsluna ella nýtsluna, soleiðis at javnvág altíð er í skipanini.

út til lægri prís, um kundin er sinnaður at avtaka orkuna, tá ið hon er tøk. Skipanin skal gerast liðug í 2022.

7. At orkumyndugleikin og samráðingarnevndin fyri Kommunufelagið/SEV seta bólk við tveimum umboðum fyri hvønn partin at kanna, hvussu ein marknaður í søluliðinum verður skipaður á ein einfaldan og ódýran hátt. Endamálið er at skapa dynamisk tilboð til brúkaran, t.d. til upphiting av húsum, løðing av bilum, elektrifisering av ídnaði, framleiðslu av grønum brennievni og øðrum brúki av vitbornari eltøkni, sum eggjar brúkaranum at leggja um til varandi orkukeldur.

   Kanningin, sum eigur at verða liðug í 2023, kann m.a. taka støði í frágreiðingini *Reform av kraftsystemet på Færøyene (AFRY)* og frágreiðingini *Fastsættelse af systemomkostninger i SEV (Deloitte)*, men nýtist ikki at vera avmarkað til niðurstøður úr hesum frágreiðingum.

   Um arbeiðsbólkurin ikki kann semjast um eitt tilmæli ella um ávísar partar av uppgávuni, kunnu landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum og samráðingarnevndin fyri Kommunufelagið/SEV gera av, hvussu víðari verður farið fram fyri at finna semjur, t.d. við í felag at tilnevna fakligan semingsmann ella serliga nevnd við fakligum førleikum at flyta málið fram á leið.

8. At lutafelagið SEV kann taka lut í granskingar- og royndarverkætlanum, sum slóða fyri meira varandi orku.

9. At orkumyndugleikin og lutafelagið SEV gera skipan fyri smærri framleiðslueindir, sum kunnu knýtast í elkervið. Skipanin eigur at verða gjørd í 2022 og eigur neyvt at áseta mesta máttin, sum slík smáverk kunnu framleiða.

10. At orkumyndugleikin og lutafelagið SEV gera skipan fyri, hvussu framleiðslueindir, sum serliga eru ætlaðar til egna nýtslu hjá orkukrevjandi vinnufyritøkum, kunnu verða knýttar í elkervið. Skipanin eigur at verða gjørd í 2022.

Orkumyndugleikin fer beinanvegin undir at dagføra elveitingarlógina frá 2007, soleiðis at lógargrundarlagið frameftir leggur upp fyri hesi avtaluni og ger tað møguligt smidliga at skipa fyri útboðum og útbygging samsvarandi tíðarfestu ætlanini í broti 5. Her verður m.a. hugsað um at fáa til vega neyðuga heimild til ognartøku av lendi, har útboð av vindorku fara fram.

Lutafelagið SEV leggur í síni íløguætlan upp fyri ætlaðu pumpuskipanini í broti 3 og fyri tíðarfestu útbyggingarætlanini í broti 5, soleiðis at elkervið frameftir er klárt at lofta øktu orkuni frá varandi orkukeldum.

Partarnir í hesi avtalu eru samdir um, at orkumyndugleikin (Umhvørvisstovan) og lutafelagið SEV frameftir eiga at miða eftir góðum, tøttum og álitisfullum samstarvi, soleiðis at komandi útbyggingar av føroyska elkervinum byggja á saklig og vælgrundað atlit, sum stuðla undir grøna orkuskiftið.

Tórshavn, 22. mars 2022

Heðin Mortensen
formaður í Kommunufelagnum

Magnus Rasmussen
landsstýrismaður

Torbjørn Jacobsen
næstformaður í Kommunufelagnum

Kári Johansen
formaður í nevndini fyri SEV